## Big Sam saknar viðurkenning

Líkt er til,a t Blackburn hevur bjargað sær lívið í bestu ensku fótbóltsdeildini, eftir at felagið um vikuskiftið vann 2-0 á Portsmouth. Venjarin Sam Allerdyce, sum tók við starvinum í desember, er nøgdur við, at liðið hevur togað leyst av botninum. - Spælararnir hjá mær hava ikki fingið nakra viðurkenning, men teir hava verið fantastiskir, og nú rokni eg við, at vit hava klárað tað, sigur Big Sam.



## Platini virðir úrslitini

Eftir umstrídda dystin millum Barcelona og Chelsea hava røddir verið frammi um, at UEFA vildi ikki hava ein reina enska finalu í Champions League aftur, og tí hjálpti dómarin Barcelona. Forsetin í UEFA heldur lítið um hesar skuldsetingar. - Tað hevði glett meg, um vit høvdu havt eina enska finalu, tí eg virði altíð úrslitini av einum fótbóltsdysti. Javnvágin fótbólti flytir seg. Fyri seks árum síaðni vóru tvey italsk feløg í finaluni, sigur Michel Platini.

HB-AB 4-0 (1-0):

# Ókeypis feria

**HB noyddist ongan tíð at sveiggja seg upp til tað stóra leikliga avrikið, men tað rakk kortini til trivaligan sigur móti einum hálvgum uppgevandi AB-liði**

*HB*

*AB*



*Rógvi Poulsen fekk góðar sømdir á veinginum, og ferð eftir ferð vóru fyrrverandi liðfelagarnir av Argjum um ein háls av kvika kantinum, sum nú spælir við HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum uppflytari hevur AB í ár verið eitt frískligt íkast til Vodafone-deildina.

Argjamenn, sum fyri tveimum árum síðani ongan tíð veruliga fótaðu sær í táverandi Formula-deildini, hava í ár veruliga prógvað, at teir vilja vera hangandi oman fyri strikuna. Uttan at hugsa alt ov nógv um móstøðuna hevur AB bygt sítt egna konsept, har stríðsvilji og góð skipan av verjupartinum vóru lyklaorðini.

### Lívshættisligt vinstrabein

Ivaleyst var hetta eisini ætlaða uppskriftin móti einum HB-liði, sum hevur havt ilt við at skora neyðugu málini í opnum spæli hetta kappingarárið. Men tað er kanska ikki tann stóri vandin, tá tú hevur ein spælara sum Rasmus Nolsøe á liðnum.

Gjøgnum fyrra hálvleik var hann støðugt tann, sum gekk á odda í hóttanunum móti AB-málinum. Dysturin var bara fáar minuttir gamal, tá AB-uppleggið varð oyðilagt av hartskjótandi láminum. Gaman í hevði Fróði Benjaminsen eitt drønandi høgg ta einu ferðina, men annars var tað Rasmus, sum stóð fyri hóttanunum. Men ta einu ferðina streyk bólturin sentimetrar framvið málinum, og stutt undan steðginum small fríspark í stólparótina, áðrenn bólturin rullaði fram við málinum.

Í aðrar mátar var ikki tað heilt stóra at skriva heim um úr Gundadali.

Hóast HB sjáldan fekk veruliga ferð á sítt spæl, so gjørdist seinni hálvleikur fyri tað mesta sera einsrættaður oman móti AB-málinum. Gestirnir megnaðu als ikki at halda fast í skipaða verjupartinum, og tá miðvøllur og kantar hjá HB fáa somikið gott pláss, um teir fingu sunnudagin, koma møguleikarnir mest sum av sær sjálvum.

Fleiri heilt vandamiklar støður spurdust eisini burturúr, áðrenn tað av álvara skrædnaði hjá AB. Páll Mohr Joensen økti við fínari uppfylgjan eftir at málverjin hevði hálvbjargað einum stjóra hjá Fróða Benjaminsen, og Fróði kom sjálvur á talvuna, tá AB-verjan gloymdi alt um sínar markeringar í frísparksstøðu. Seinasta seymin smíðaði Bjarni Jørgensen við frálíkum skoti eftir hornaspark.

### Stigini telja

Sigurin – saman við hinum úrslitunum hetta umfarið – ber við sær, at HB nú er einsamalt oddalið í Vodafone-deildini. Kanska ikki við so øgiliga reypandi spæli, men á pappírinum hava teir longu verið uppi ímóti EB/Streymi, NSÍ, Víkingi og B36, so áðrenn fyrsti triðingurin er av, eigur HB nú bara tær á pappírinum løttu uppgávurnar eftir.

Rósurnar um spælið hava kanska ikki verði so øgiliga nógvar, og tað tók fast, at liðið reyk úr steypakappingini. Men úrslitini í landskappingini ber illa til at seta ein fingur á. Og tað eru hesi, sum telja.

Hinvegin vekir tað ans, at tað framvegis er trupult hjá liðnum at skora í opnum spæli. Teir tríggjar seinastu dystirnar hevur HB skotið níggju mál, sum øll eru komin eftir deyðbóltar! Men tað er nú eisini ein dygd í sjálvum sær.

Stigini telja eisini hjá AB, sum higar til hevur afturpartin oman fyri vandamiklu strikuna, og tað í sjálvum sær er aðalmálið hjá liðnum. Við tiltiknu orðunum hjá Søren Lerby, so ert tú tó ongan tíð betri enn seinasti dysturin prógvaði, og hesin bar altso ikki boð um eitt lið, sum vil liva oman fyri strikuna. Og tað er so púrasta vist, at skal AB framvegis halda seg oman fyri strikuna, so skal avrikið móti EB/Streymi og Víkingi vera nakað væl betur, enn tað var móti HB sunnudagin.

## Heldur bratt

Annar av venjarunum hjá AB, Allan Mørkøre, helt eftir dystin sunnudagin, at skjóta leiðslumálið hjá HB gjørdi brekkuna hjá AB dekan ov tunga.

- Vit eru klárir, tá vit fara inn til dystin, men ein slík deyðbóltsstøða eigur ikki at geva mál, og so verður mótbrekkan dekan ov brøtt, segði Allan Mørkøre.

- Restina av fyrra hálvleiki halda vit teimum frá teimum nógvu møguleikunum, men eftir steðgin verða vit spældir sundir og saman. Og tað er rættiliga skuffandi. Eyðkennið hjá okkum í ár hevur verið, at vit hava stríðst rættiliga væl, og tað var ikki til at fáa eyga á í dag.

Hóast vónbrotið í Gundadali, so er Allan Mørkøre væl nøgdur um fyrstu seks umførini hjá AB.

- Vit hava fingið fleiri stig, enn tey flestu roknaðu við, og vit eru í hálvfinaluni í steypakappingini. Vit hava víst, at vit eru truplir at spæla ímóti, og fyri tað mesta hava menn stríðst sera væl. Og tað er tað, sum vit skulu finna framaftur, áðrenn vit nú hitta EB/Streym tvær ferðir, segði Allan Mørkøre.

**-mørk**

## Skulu halda bóltinum

Páll Mohr Joensen, sum skoraði næsta HB-málið, helt eftir dystin, at tá leiðslan gjørdist tvey mál, var dysturin meira ella minni av.

- Sæð burtur frá málinum, so hendir ikki so nógv fyri steðgin. Men tá vit økja til 2-0, fer gassið av ballónini hjá teimum. Tá megna vit at koyra bóltin runt í okkara rekkjum, og so eru vit ógvuliga truplir at spæla ímóti, segði Páll Mohr Joensen.

Og so helt Páll annars, at stigatalvan sigur tað, sum skal sigast um HB.

- Tað kann vera, at vit ikki hava spælt so vakran fótbólt, sum fleiri vilja hava. Men stigatalvan sigur okkum, at vit eru ovasta liðið, og so er spurningurin vælsaktans, hvat tað er at spæla væl. Sjálvur vil eg í øllum førum heldur hava stigini, staðfesti Páll Mohr Joensen.

**-mørk**